# Snældan hevur spunnið síðani 1949

**Snældan er fyritøka, ið hevur verið í somu familju síðani 1949. Tógv og troyggjur eru millum vørurnar, og millum kappingarneytar á økinum, so er Snældan eina um at hava alt virksemið í Føroyum**

Snældan byrjaði í 1949 og hevur øll árini verið í somu familju. Tað byrjaði sum spínnarí, har tey tóku ull inn og spunnu fyri fólk.

Seinni varð farið undir at framleiða bundnar vørur, og er gamla fyritøkan kend á júst hesum økinum.

Merkisvert er eisini, at nú er Snældan í kapping við onnur á økinum, men Snældan er einasta av fyritøkunum, ið hevur alt virksemið í Føroyum, tí onnur hava flutt partar av virkseminum eitt nú til lond eystanfyri.

### Tógv

Á Sælduni vilja tey ikki beinleiðis váttað, at talan er um tógvi stríð, men ásannast má, at júst tógv fyllir nógv í framleiðsluni.

- Vit selja nógv tógv, sonevnt nappað tógv, og so er tað eisini sonevnt skipstroyggjutógv. Vit hava framleitt og selt so nógv tógv, at stundir hava ikki verið at gjørt so nógv við troyggjurnar, tí orka hevur ikki verið til tess, verður sagt á Snælduni.

### Fleri snið

Snældan framleiðir mong ymisk snið av troyggjum. Sniðini vera gjørd av teimum, ið arbeiða á Snælduni, men Snældan hevur eisini keypt frá sniðgevum í Føroyum.

Snældan er fyritøka, hvørs virkisbygningur er á Strondum, men umframt hevur Snældan eisini handil í Havn.

Í alt arbeiða 8 fólk á Snælduni.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*












